# Størv á Føroya Barnaheimi

Við hesum verða trý størv á Ungdómsdeildini á Føroya Barnaheimi lýst leys at søkja. Talan er um trý fulltíðarstørv. Tey, ið sett verða í starv koma at arbeiða í skiftandi vaktum. Normering á deildini telur 8½ størv, har deildarleiðarastarvið er 9 íroknað. Á Ungdómsdeildini er pláss fyri seks børnum í aldrinum 12-18 ár, umframt er eitt bráfeingispláss.

Talan er um eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum stórum og fjølbroyttum avbjóðingum. Endamálið við arbeiðinum á Ungdómsdeildini er fyrst og fremst at geva børnunum/teimum ungu umsorgan og tryggleika, samstundis sum dentur verður lagdur á at vísa á týdningin av gevandi og mennandi samveru, av einari skipaðari tilveru, av at álit valdar og at menniskju virða hvørt annað. Hetta verður gjørt við einum skipaðum og viðkomandi dagligdegi, við áhuga og nærleika, við serligum átøkum og ikki minst við regluligum samrøðum og øðrum samskifti. Tað er greitt mál hjá Ungdómsdeildini at samstarva so væl og tætt, sum til ber, við foreldur og játtandi myndugleikar, umframt aðrar viðkomandi starvsbólkar og/ella stovnar.

Til teirra, sum eru í starvi á Føroya Barnaheimi stendur í boði at fáa meiri og minni skipaða eftirútbúgving, arbeitt verður við at fáa henda tátt lagdan í fastari karmar. Í boði stendur at fáa regluliga og gevandi supervisión umframt eitt avbjóðandi og spennandi arbeiðsumhvørvi. Á stovninum eru greiðar húsreglur, sum eisini starvsfólkini skulu virða, men annars eru ríkir møguleikar at seta dám á bæði arbeiðið og arbeiðsplássið.

Sóknast verður eftir umsøkjarum við viðkomandi útbúgving. Sum er, eru øll starvsfólkini á deildini námsfrøðingar, men skal hetta ikki skiljast soleiðis, at rúmd ikki er fyri øðrum starvsbólkum, kvinnum sum monnum, á Ungdómsdeildini. Tó skal viðmerkjast, at ein partur av arbeiðinum er at skriva dagligar frágreiðingar umframt støðulýsingar, og er tað tí ein fyrimunur, um umsøkjari dugur at orða seg í talu og skrift.

Lønin hjá starvsfólkum á Føroya Barnaheimi er altíð ein spurningur, sum avvarandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið avgreiða.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. Juni 2008.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Lauru Poulsen, virkandi deildarleiðara ella Finn Helmsdal, leiðara á tlf. 312320.

**Føroya Barnaheim | Pedda við Steingøtu 10 | 100 Tórshavn**





# Hús í Kollafirði TIL SØLU

Grundøkið er umleið 570 fermetrar. Húsini eru í trimum hæddum. Miðhædd og kjallari eru umleið 84 fermetrar hvør, og ovasta hæddin er umleið 63 fermetrar.

| | |
|---|---|
| Í miðhædd eru: | Køkur, spísistova, stova, grovkøkur, spískamar, gangur, wc og eitt sovikamar. |
| Á loftinum eru: | Trý kømur, baðiverilsi og loftsstova. |
| Í kjallaranum eru: | Kjallararúm, hjallur, vaskirúm og fýrrúm, gangur og eitt stórt kamar. |

Húsini eru frá 1970. Takið er nýtt (2007), klædningur og vindeygu eru skift á tveimum síðum. Restin er undir umvæling og verður liðugt í juni.

Bilhús á 35 fermetrar. Stór terassa er vestureftir og vakur urtagarður.

Boð undir 1,5 mió. kr. hava ongan áhuga.

**Tlf. 42 17 47 ella 26 38 89**

www.123hjemmeside.dk/siv__joensen



# Móttøkufólk



## Starvsfólk til móttøkuna og skrivstovuna

**Í móttøkuni hjá Miðlahúsinum** er starv leyst, nú eitt av starvsfólkum okkara fer av landinum í útbúgvingarørindum. Vit rokna við, at tú byrjar í starvinum í seinasta lagi 1. august, men um møguligt síggja vit fegin, at tú byrjar fyri ta tíð.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna, og fevnir starvið um kundamóttøku og –avgreiðslu av viðskiftafólkum hjá Rás2 og Sosialinum. Bæði umvegis telefon og í beinleiðis samskifti við tey mongu, sum hvønn dag støkka inn á gólv hjá okkum í Vágsbotni. Eisini fevnir starsvøkið um part av skrivstovuarbeiðinum hjá Rás2 og Sosialinum. Skrivstovuútbúgving er tí ein fyrimunur, men hetta verður ikki sett sum treyt.

Vit kunnu bjóða tær starv í eini spennandi fyritøku, sum hevur verið í stórari menning seinastu nógvu árini, og sum í dag er eitt veruligt miðlahús við framleiðslum og tænastum á fleiri miðlapallum.

Merki brævbjálvan »umsókn« og sendi hesa til:
*Sosialurin*
*Postsmoga 76*
*110 Tórshavn*

Áhugað kunnu eisini ringja til Jan Müller ella Regin I. Jakobsen á tlf 341800, ella senda teldupost til:
jan@sosialurin.fo ella
regin@sosialurin.fo

Seinasta freist at søkja starvið er 13. juni 2008.

Samtakið kring Miðlahúsið fevnir um Sosialin og Miðlavarpið, ið rekur Rás2.
Í samtakinum starvast í dag 42 fólk.

**Sosialurin** Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn



# Skrá fyri Bátastevnuna í Vestmanna 2008

**Fríggjadagin 23. mai:**

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00 – 22.00 | Stubbin hevur framsýning av húsvognum og bátum v.m. inni á Fjørð. |

**Leygardagin 24. mai:**

| | |
|---|---|
| | Koyr í haganum, ella koyr rally við ATV motorsúklum, all terraine vehicle. Bílegg túr og fá meir at vita á tlf. 289090 ella á www.atv.fo. |
| Kl. 09.00 – 22.00 | Stubbin hevur framsýning av húsvognum og bátum v.m. inni á Fjørð. |
| Kl. 10.00 – 14.00 | Vestmóti og Romantique hava opið. Tjaldrið fylgir við bátunum frá Glyvursnesi. |
| Kl. 14.30 | Allir bátarnir savnast við Fútaklett. Gamli postbáturin Ólavur tekur ímóti og skipar innsiglingina til Vestmanna. Boð verða givin á kanal 8. |
| Kl. 15.30 | Bátarnir koma inn móti keiini, og manningarnar fáa vegleiðing um, hvussu bátarnir skulu liggja. Húsvognar møtast við Skipasmiðjuna og motorsúkklur møtast á bryggjuni. Heit suppa við onkrum góðum afturvið inni í stóra tjaldinum á keiøkinum. Morgunbreyð kann bíleggjast - verður borið út sunnumorgunin. |
| Kl. 15.00 | Bryggjan hevur opið. |
| Kl. 16.00 | Bjargingarroynd verður á vágni við bjargingarbátum og tyrlu. |
| Kl. 16.00 – 19.00 | Mini-tivoli í ítróttarhøllini við m.ø. tombola, hoppiborg, hárpríði, andlitsmáling, bóltkasti við ferðmátara, fiskibrunni, kaffisølu og lutaseðlasølu. |
| Kl. 16.00 – 20.00 | Ungdómshúsið *Staðið* hevur fernisering við ungum evnaríkum listafólkum. Ása Wraae syngur. Myndaframsýning um Geilina. Kaffimunnur kann keypast. |
| Kl. 17.00 – 24.00 | Fjørukrógvin hevur opið. |
| Kl. 18.00 | Grilling á keiøkinum. Søla av teimum vælumtóktu Bátastevnubúffunum. |
| Kl. 18.30 | Sámal Ravnsfjall og Jóan Jakku Guttesen syngja og spæla á keiøkinum. |
| Kl. 24.00 | Fýrverk á keiøkinum. |
| Kl. 23.00 – 04.00 | Dansur í ítróttarhøllini við Thunderbirds og Bridge. Náttbussurin koyrir soleiðis í sambandi við dansin: Kl. 22.00 Úr Vestmanna til Havnar; Kl. 23.00 Úr Steinatúni í Havn og steðgar á vanligum støðum; Kl. 04.30 Úr Vestmanna eftir dansin frá Torginum yvir Kvívík og Kollafjørð til Havnar |

**Sunnudagin 25. mai:**

| | |
|---|---|
| Kl. 12.00 – 17.00 | Fjørukrógvin hevur opið |
| Kl. 14.00 – 20.00 | Stubbin hevur framsýning av húsvognum og bátum v.m. inni á Fjørð |
| Kl. 16.00 – 20.00 | Ungdómshúsið Staðið hevur opið. Listaframsýning við ungum evnaríkum listafólkum og myndaframsýning um Geilina. Kaffimunnur kann keypast. |